Sepideh Taheri, yvirlækni í barnasjúkum við føroysk foreldur:

Farið út í tún og roykið

Meðan nógv verður gjørt í øðrum londum sum USA, Bretlandi og Týskalandi fyri at fáa fólk at minka ella gevast at roykja, so tykist gongdin í Føroyum verða tann øvugta, at roykingin líkasum verður meira góðtikin her. Tað heldur Sepideh Taheri, yvirlækni í barnasjúkum á Landssjúkrahúsinum vera stórt spell. Barnakonur eiga als ikki at roykja, og foreldur eiga ikki at roykja í heiminum. Í báðum førum skaðir hetta barnið

Jan Müller
Alvur Haraldsen

-Vilja føroysk foreldur sínum børnum væl og vilja tey elska og geva børnunum ein møguleika fyri einum sínnum lívi, so eiga tey at minka um roykingina ella heilt gevast. Hetta eru ráðini, sum Sepideh Taheri, yvirlækni í barnasjúkum starvast á Landssjúkrahúsinum, hevur at geva føroyskum foreldrum, nú tað í dag er altjóða roykifríur dagur.

Ráð hennara til allar føroyskar barnakonur: roykið ikki meðan tit eru við barn - og til øll føroysk foreldur: farið út í tún og roykið - ella enn betur - gevist við at roykja. Og ráð hennara til myndugleikarnar eru eins greið: bannið royking á almennum plássum.

Tað eru ikki altíð, at ráð verða væl móttikin, men hesi ráðini eru ikki frá nøkrum tilvildarligum leikmanni. Tey byggja á grundleggjandi vitan og royndir frá arbeiðinum við børnum. Sum lækni á føðideild og barnadeild á Landssjúkrahúsinum hevur Sepideh kanska betri møguleika enn nakar annar at meta um vandarnar, ið standast av royking. Hon upplivir og sær tað dagliga á sínum arbeiðsplássi.

Sum professionellur eygleiðari av barninum frá tí tað er í móðurlívi til tað veksur upp eru Sepideh og hennara starvsbrøður og -systrar góð sannleikavitni, tá tað um heilsuna hjá barninum ræður.

Hóast hon hevur sagt tað mangar ferðir áður, heldur tað vera rætt at endurtaka tað og leggja serliga áherðslu á tað, nú allur heimurin heldur roykfrían dag.

Barnakonur eiga als ikki at royka. Vilja tær barninum væl, so eiga tær ikki at nema eina sigarett frá tí at tær eru blivnar upp á vegin og til tær hava átt. Og eisini eftir tað eiga mammur og pápar at halda royking og barn atskilt.

Roykingin ávirkar barnið bæði meðan tað er í móðurlívinum og eisini í vanliga lívinum eftir føðing. Børn hjá barnakonum, sum roykja, blíva minni, tey vaksa ikki so nógv, tey hava trupulleikar við andadráttinum, og seinastu kanningarnar vísa, at vandin fyri at fáa meningitis er fimm ferðir størri hjá børnum, har mammurnar hava roykt, meðan tær vóru við barn. Eisini vøggudeyðin er størri, har mamman hevur roykt, somuleiðis talið av deyðføddum børnum. Tað vísir seg eisini at verða børnini fødd ov tíðliga orsakað av, at mamman hevur roykt, so fáa tey eisini nógv fleiri komplikatiónir eftir tað og seinni í lívinum. Hesi børnini fáa t.d. hægri blóðtrýst og oftani hjartatrupulleikar fyrr enn onnur fólk fáa tað.

Roykið ikki heima

Eitt er so tað, at barnakonur ikki eiga at roykja. Annað og ikki minni týdningarmikið er at minka um ella heilt sleppa undan royking í heiminum, har børnini vaksa upp.

Sepideh Taheri, sum er í tí hepnu støðu, at hon eisini kann fylgja børnunum víðari í lívinum, tá fleiri teirra koma inn á barnadeildina við ymsum sjúkum, er tí eins avgjørd, tá tað um royking í heiminum ræður.

Royking í heiminum er ein stórur risikofaktor fyri, at børn fáa astma. Tað vísir seg eisini, at støðugt størri tal av børnum fáa astma. Royndirnar vísa, at vaksa børnini upp í einum roykifríum heimi, ber til at fyribyrgja astmatilburðum. Royking í heiminum hevur so eisini aðrar avleiðingar fyri heilsuna hjá børnunum. Hjá børnum, sum koma frá heimum, har tað verður roykt, er risikoin fyri, at tey fáa aðrar sjúkur eisini nógv størri. Eitt nú millumoyrnabruna og lungnabruna.

Sepideh Taheri undirstrikar, at roykingin í heiminum skundar undir risikoina at fáa hesar sjúkur ikki bert ta einu ferð men afturvendandi.

Granskingararbeiðið, sum er gjørt av hesum, vísir heilt greitt, at tað er samband millum hesar sjúkur og royking í eitt nú heiminum.

Ymisk tiltøk

Í sambandi við roykafría dagin í dag verður skipað fyri ymsum tiltøkum kring landið. Eisini hevur løgtingsskrivstovann sent soljóðandi tíðindaskriv út:

„Roykipolitikkur er partur av almenna starvsfólkapolitikkinum:

Arbeitt verður við at orða eitt uppskot til roykipolitikk. Arbeiðið er komið somikið áleiðis, at uppskotið verður sent stovnum og feløgum til hoyringar í juni mánað.

Støðið undir starvsfólkapolitikkinum er ásannanin av, at royking er heilsuskaðilig, og tí skal roykipolitikkurin tryggja eitt so roykfrítt arbeiðsumhvørvi sum gjørligt.

Hetta arbeiðið verður gjørt í starvsfólkapolitikknevndini, sum setur út í kortið og ger leiðreglur fyri, hvussu farast skal fram í starvsfólkapolitiskum viðurskiftum innan almenna fyrisiting.

Ætlanin er, at roykipolitikkurin skal avloysa rundskrivið um royking frá 89.

Eins og hinir partarnir av starvsfólkapolitikkinum, verður roykipolitikkurin sendur stovnum og yrkisfeløgum, tá hann er staðfestur. Eisini verður politikkurin lagdur á heimasíðuna hjá løgtingsskrivstovuni.

Søpideh Taheri, barnalækni vil ráða øllum føroyskum foreldrum, sum vilja børnum sínum væl um ikki at roykja í heiminum.Mugu tey roykja, so farið út í tún.

Sum yvirlækni í barnasjúkum bæði á føðideild og barnadeild á Landssjúkrahúsinum er Sepideh Taheri vitni til, at alsamt fleiri føroysk børn taka skaða av, at foreldrini roykja. Tað vil hon fegin brúka altjóða roykifríadagin til at ávara ímóti.

Kórstevnan av bakkastokki í kvøld

Í kvøld byrjar Kórstevnan 2000 og á skránni er mangt forvitnisligt. John Høybye vitjar við Tritonuskórinum og hann leiðir eisini felagskórið. Eisini hevur hann gjørt spennandi útsetingar til føroysk løg og norskur dirigentur vitjar eins og kend svensk songkvinna

John Høybye. kórleiðari, hevur sett út fyri kór løgini Eitt dýpi av dýrari tíð og Um eg kundi kvøðið

Dagfinn Olsen

Í kvøld fer Kórstevnan 2000 av bakkastokki. Stevnan verður sett á Eysturskúlanum klokkan 20. Har búgva luttakararnir eisini og venjingarnar fara eisini fram har.

Konsertir verða í Eysturskúlanum, Vesturkirkjuni og í Norðurlandahúsinum.

Høybye, Dahl og Johansson

John Høybye er ikki ókendur í Føroyum. Hann hevur mangan vitjað.Honum dámar væl í Føroyum, tí sum hann sigur, so kemur sólin altíð fram fyrr ella seinni.

Eisini heldur hann nógv av føroyingum sum hann metir hava listarmannsins sinn og so syngja føroyingar væl og „er skøre på en charmerende måde".

John Høybye skal leiða felagskórið í ár og hetta hevur hann roynt áður. Eisini hevur hann skrivað tónleikin, ið nýttur var, tá kirkjan í Fuglafirði var vígd í 1984. Hann hevur í mong ár havt samband við Frits Johannesen og kórini í Fuglafirði.

Í ár vitjar John Høybye í Føroyum saman við sínum Tritonuskórið. Kórið er eitt av teim kendastu í Danmark og hevur ferðast í Europa, Kina, Japan, USA og hevur vunnið fleiri virðislønir. M.a. í Budapest í 1995.

Aðalverkið hjá Høybye og kórinum verður Sacret Concert eftir Duke Ellington, sum Høybye hevur lagt tilrættis fyri kór, solist og stórband.

Solistur verður Eleonora Johansson úr Svøríki og orkesturlutin hevur føroyski úrvalsbólkurin Jaspis.

Eleonora Johansson er kend songkvinna og er partur av The Real Group, ið má sigast at vera á sera høgum støði. Kann kanska sammetast við The Manhattan Transfer.

Norski dirigenturin Tone Bianca Dahl fer eisini at taka sær av felagskórinum. Hon tekur sær av stillara og norðurlandska sangpartinum.

Heinesen, Samuelsen og Djurhuus

Sum nakað øðrvísi og spennandi, verða eisini tvær framførslur av føroyskum tónleiki.

John Høybye hevur sett út fyri kór sangin hjá Jens Paula og Elini Heinesen, Eitt dýpi av dýrari tíð. Eisini hevur hann sett út fyri kór sangin hjá Janus Djurhuus og Stanley Samuelsen, Um eg kundi kvøðið.

Um skránna er annars at siga, at fleiri konsertir eru.

Hóskvøldið syngur Tritonuskórið í Vesturkirkjuni.

Fríggjadagin verður intern konsert í Eysturskúlanum við Tritonus, Ljómi, Manskór Keflavíkar og Eleonoru Johansson.

Leygarkvøldið er so stóra konsertin í Norðurlandahúsinum, við felagskórinum, Tritonus og Jaspis framføra Sacret Concert hjá Ellington, ið er Kirkju/swing oratorii og Eleonora Johansson er solistur.

Kórstevnan er seinni í ár, enn vanligt er, hóast hon sum altíð fellur á Krisiti himmalsferðardag. Enn hava ikki so nógv teknað seg til luttøku, sum onkutíð fyrr, men enn er ikki ov seint. Til ber at luttaka við at møta upp, tá stevnan byrjar ella við at ringja á telefon 31 48 50.

Umframt konsertirnar og venjingar, verður á kvøldi skipað fyri hugna og sonevndum aftersinging, so óivað er lagt upp til eitt hugnaligt vikuskifti á sanganna veingjum.

Tað eru kórini í Havn og Kórsamband Føroya, ið skipa fyri.

Kórini í Havn og Kórsamband Føroya skipa í ár fyri kórstevnuni *(Savnsmynd)*

Vann gull

Tað gongur væl hjá føroyingunum, sum eru við í Special Olympics. Durita Strøm vann fyrrakvøldið gull í svimjing

Fyrradagin svumu føroysku svimjararnir í finaluni, eftir at vera kominir víðari.

Tað gekk væl og Durita Strøm vann gull í 50 metra frísvimjing. Halla Poulsen gjørdist nummar 2 og fekk silvur og Símun P. Zachariassen fekk eitt flott 4. plass, frætta vit úr Hálandi.

Føroysku rennararnir runnu í gjár 5000 metra teinin og væl gekk. John Joensen rann teinin uppá 23:31 minuttir og gjørdist nummar 4 av 8 í sínum hópi. Jonhard Haraldsen rann teinin uppá 32:13 og gjørdist nummar 7 í sínum hópi.

Eisini Johanna Maria Niclasen og Unn Mortensen runnu í gjár og tað frætist, at væl gekk.

Í gjár skuldu menninir renna 1500 metra teinin.

Sagt verður, at bólkað verður soleiðis, at ein altíð kappast ímóti javnmettum mótstøðufólkum. Eisini eru kappingarnar so háttaðar, at talan er um nógvar vinnarar. Enn eru fleiri kappingar og finalur eftir at luttaka í á leikunum í Hálandi.

- do -

Føroya Handilsskúli á Kambsdali søkir eftir

AVLOYSARA TIL SKRIVSTOVUNA

at byrja 7. august 2000

Starvslýsing
Starvið umfatar alt vanligt skrivstovuarbeiði í samband við handilsskúlan.

Førleikakrøv
Útbúgving og/ella royndir innan skrivstovuyrkið, góður kunnleiki til teldu og bókhald. Í arbeiðnum hevur tú samband við nógv fólk, bæði innanhýss og uttanhýsis, og tí mást tú verða opin og virkin.

Vit kunnu bjóða
Eitt fjøltáttað og fjølbroytt starv við nógvum ymiskum uppgávum.

Setanartreytir
Sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Starvið er tíðaravmarkað til uml. 1. februar 2001.

Umsóknarfreist
Umsóknin skal verða Handilsskúlanum á Kambsdali hendi í seinasta lagi 14. juni 2000.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til deildarstjóran á Handilsskúlanum á Kambsdali á tel 44 49 00.

FØROYA HANDILSSKÚLI
Á Kambsdali, tel 44 49 00